Jól í gomlum døgum á Hoyvíksgarði

Heima á Garði í Hoyvík ber til at uppliva jólahugna í einum føroyskum bóndagarði í gomlum døgum

JÓLAHUGNI
Tíðindaskriv

Sunnudagin komandi seinnapartin millum klokkan 15 og 18 lata tey hurðarnar upp í øllum útisavninum í Hoyvík, soleiðis at fólk sleppa innar at uppliva lívið upp undir jól á einum bóndagarði fyrr í tíðini.

Ætlanin er, at foreldur við børnum kunnu fara eitt sindur burtur frá nútímans jagi og stressi og slappa av í skýmingini í tí hugnaliga umhvørvinum Heima á Garði.

Høvi verður at síggja bóndahúsini innan, meðan húsfólkið stákast við at baka og gera okkurt plaggið liðugt, onkur sigur eina søgu, og tú heldur skýming.

Smiðurin greiðir frá smíðnum í smiðjuni. Eldur er í essuni, og amboðini standa til reiðar.

Í hoyggjhúsinum fjalir onkur vættur seg millum hoyggj og torv og gomul amboð.

Tarvafjósið, fjósið og svalihúsið goyma okkurt smátt, eitt sindur forvitnisligt.

Og í turkihúsinum fæst ein drekkamunnur og onkur góður biti til keyps, bæði fyri vaksin og børn.

Gevið jólamanninum suttuna

Øll børn kunnu geva Kjøtkróki suttuna fríggjadagin og leygardagin. Fríggjadagin spælir Tórshavnar Ungdómshornorkestur eisini á Torginum

Í dag og í morgin fer jólamaðurin, Kjøtkrókur, at taka ímóti suttum frá børnum, sum vilja leggja av at nýta suttu

JÓLAMAÐUR
Tíðindaskriv

Fríggjadagin 14. og leygardagin 15. desembur vitjar Jólamaðurin, Kjøtkrókur, í SMS. Hann fer at halda til frammanfyri jólabýin á Torginum. Øll børn, sum brúka suttu, og ynskja at leggja av, kunnu geva Kjøtkróki suttuna. Aftur fyri fáa tey ein lítlan mjólkarpakka frá MBM og frukt.

Í fjør um hetta mundið tók Kjøtkrókur eisini ímóti suttum á Torginum. Tá góvu rættuliga mong børn honum suttuna, og hann vónar, at hesaferð fær hann eins nógvur suttur, um ikki fleiri.

Við sær í SMS hevur Kjøtkrókur eisini allar suttrurnar, hann fekk í fjør.

Fríggjadagin ber til at geva Kjøtkróki suttuna ímillum kl. 16.00-17.30 og leygardagin ímillum kl. 12.00-14.00.

Beint eftir vitjanin hjá Jólamanninum fríggjadagin spælir Tórshavnar Ungdómshornorkestur jólatónleik á Torginum. Samstundis sum tey spæla, selja tey eisini lutaseðlar til frama fyri eina konsertferð. Vinnararnir verða funnir eftir framførslu teirra á Torginum, verður sagt úr SMS.

SKALA ÍTRÓTTARFELAG

Skála Ítróttarfelag takkar sponsorum og viðhaldsfólki, fyri dyggan stuðul í fama kappingarári. Øllum verður ynskt eini gleðilig jól og eitt av Harranun singað nýttár

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara kæra mamma

Anna Jensen
fødd Ellingsgaard
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mikumorgunin
12. desember 89 ára gomul.

Jarðarferðin verður leygardagin
15. desember kl. 13.00 úr Dómkirkjuni.

Fa il ar v a

Jákup og Annfinnur

Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata herberginum
hjá Frelsunarherinum eina gávu, konto í Sparikassanum.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæri sonur, beiggi, svágur, mammubeiggi og pápabeiggi okkara

Mikkjal Sjúrður Olsen

so brádliga doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri vøkur orð í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Til tykkum, sum sendu blómur og kransar og fyri peningagávur, sum fóru til Svínoyar kirkju og til barna- og ungdómsarbeiði í Hvannasundi. Og til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini. Ein serlig tøkk til manningina á Havhesti fyri tað arbeiði tit gjørdu umborð.

Fyri y avvar a i

Mamma og systkini

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá okkara góði maður, pápi, verpápi, abbi
og langabbi

John Nicolajsen
Skopun

doyði og varð jarðaður.
Tøkk til tykkum á Áargarði, sum vóru so góð við hann
ta tíð, hann var har. Tøkk til tykkum í Betania.
Finnur Hansen fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk fyri blómur og kransar. Tøkk til tykkum øll,
sum hjálptu til við ervið, og til tykkum, sum fylgdu
honum til hansara síðsta hvíldarstað. Tøkk øll somul.

Fa .v a

Sára

Útlendska veiðan undir Føroyum:

Hava veitt góð 300.000 tons í ár

Samlaða útlendska veiðan fyrstu 11 mánaðarnar í ár er komin upp um 300.000 tons. Og tað er svartkjafturin, sum ger munin. Ísland, Noreg og ES hava í ár veitt 202.000 tons av svartkjafi undir Føroyum og trekkja vit tey frá samlaðu útlendsku veiðuni upp á 301.443 tons, so eru vit niðri á einum miðal árið hvat útlendskari veiðu viðvíkur

FISKIVEIÐA
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Russar hava hinvegin veitt minni av svartkjafti enn teir plaga. Teir hava veitt 79.000 tons fyrstu 11 mánaðarnar í ár, teir plaga vanliga at liggja um 100.000 tons hesa tíðina.

Ongin kongafiskur

Kongafiskur, sum føroyskir djúphavstrolarar pástanda at russar veiða í ólukkimát undir Føroyum, figurerar slett ikki í yvirlitinum hjá Fiskiveiðueftirlitinum fyri teir fyrstu 11 mánaðarnar í ár. Men russar hava veitt 1675 tons av øðrum fiskasløgum, so tað kann vera at kongfiskurin finnst her. 1675 tons er fittur partur av fiskiskapinum hjá einum ísfiskatrolara.

Norðmenn eru ógvuliga drúgvir undir Føroyum og teir eru farnir at brúka fleiri fiskidagar enn russar. Teir vóru her tilsamans 1835 fiskidagar og tað gevur í meðal fimm fiskiskip hvønn einasta dag, hesar fyrstu 11 mánaðarnar. Norðmenn eru her við svartkjaftabátum, tá verktíðin er, síðan liggja línubátarnir ein stóran part av árinum. Teir eru nú farnir heim at halda jól, og koma talsterkir aftur beint eftir nýggjár. Januartúrurin rokna teir sum ein tann besta á árinum. Teir frysta fiskin umborð. Bert ein kalvabátur er undir Føroyum í løtuni.

Bretar nyttu 20 fiskidagar undir Føroyum í november og millum annað hesin Hulltrolarin, sum var tikin fyri ólógliga veiðu royndi undir Føroyum í november

Mynd: Jens K. Vang

Lakur november

Tølini fyri botnfisk, sum útlendsk skip hava veitt undir Føroyum í november eru smá. Bert tvey ES lond hava roynt undir Føroym í hesum tíðarskeiði, tey eru Bretland, sum hevur veitt 60 tons og Frakland, sum hevur veitt 530 tons.

Bretland hevur nýtt 20 fiskidagar og í hesum tíðarskeiði hava teir veitt 5,9 tons av toski, 18,1 tons av hýsu, 20,1 tons av upsa, 8 tons av kongafiski og annars eitt sløg av øðrum fiskasløgum.

Franskir djúpvatstrolarar liggja meira ella minni fast undir Føroyua alt árið og í november nýtti teir 87 fiskidagar undir Føroyum, tað merkir at minnst tríggir trolarar vóru í føroyskum sjógvi. Fronsku djúpvatnstrolararnir fiska mest blálongu av botnfiski. Teir veiddu 57 tons, síðan veiddu teir 25 tons av upsa og 21 tons av kongafiski. Teir royna so djúpt, at ongin toskur var í teirra fiskiskapi. Ein franskur svartkjaftabátur hevur eisini verið í føroyskum sjógvi. Hann fekk 278 tons av svartkjafti.

Tølini frá fiskiveiðueftirlitinum vísa eisini, at ein norskur kalvabátur hevur undir Føroyum í november og hann hevur roynt allan mánaðin. Hann hevur fingið 6,5 tons av kalva og bara eitt sløg av øðrum fiskasløgum.

Einir 12 russiskir svartkjaftatrolarar hava roynt undir Føroyum í november. Teir hava nýtt 378 fiskidagar og hava veitt 17.024 tons av svartkjafti. Russisku trolararnir hava eisini fingið 38 tons av gullaksi og góð 1000 tons av ansjosum. Sambært tølunum hava teir ikki fingið so mikið at kongafiski, at tað er nevnt serstakt í yvirlitinum, men teir hava veitt 385 tons av øðrum, so her kann kongafiskur vera uppi í.

Íslendingar hava veitt 20.000 tons av svartkjafti undir Føroyum í november.